# lig

## FAKTA

Av heimsins oljufeltum, eru tað bara á leið 120, sum framleiða meira enn 100.000 tunnur um dagin. Framleiðslan á hesum svarar til 49% av samlaðu oljuframleiðsluni í heiminum.

Bara á 14 oljufeltum er framleiðslan meira enn 500.000 tunnur um dagin. Framleiðslan á hesum svarar til 20% av samlaðu heimsframleiðsluni. Miðalaldurin á hesum feltunum er 53 ár.

Í Miðeystri eru 3-5 oljufelt, sum framleiða á leið 90% av samlaðu framleiðsluni í økinum.

Í eini senats-hoyring eftir oljukreppuna í 1973, var bert ein persónur, sum helt, at oljuframleiðslan var í vanda. Bill Messick frá Chevron staðfesti: »Oljugoymslurnar verða troyttar alt ov skjótt, og tað er eingin møguleiki, at vit framhaldandi kunnu halda gongd í slíkari framleiðslu«

Samrøðan hjá Matthew R. Simmons á Financial Sense, kann lesast á slóðini:
http://www.financialsense.com/transcriptions/Simmons.html



*Við bók síni, Twilight in the Desert, hevur Matthew R. Simmons av álvara gjørt upp við vanligu fatanina av heimsins oljuríkidømi*

til ber at finna. So er einki nýtt stórt felt komið undan kavi.

Í hesum sambandi verður eisini víst til eina kanning, sum franska oljumálaráðið gjørdi fyri eini 20 árum síðani. Sum eitt slag av simplum loggiki, so er tað onkursvegna ein greiður tendensur í oljuleiting, sum ger, at tú rættiliga skjótt rakar við næst størsta partin av einum felti - drotningina. Vitanin, sum tú fært til vega við hesum, ger, at tú hampuliga skjótt finnur kongin, og síðani verða

> ” *Hóast leitingin í Saudi-Arabia hevur verið meira intensiv seinastu 40 árini, og hóast útgerðin at leita og bora við hevur verið tann besta, sum til ber at finna. So er einki nýtt stórt felt komið undan kavi hesi árini.*

fleiri lordar funnir nærhendis. Og tá alt kongshúskið er funnið, gest talan ikki um nevniverdar nøgdir, sum verða funnar eftir hetta. Verður hetta sammett við Saudi Arabia, so funnu tey kongin longu í 1940, tá Abqaiq-feltið varð funnið. Og framleiðslan í hesum toppaði altso longu í 1972!

Timmons metir sjálvur, at metingarnar um oljufelt, sum vórðu gjørdar áðrenn 1979, tá OPEC tengdi framleiðslu og goymslur saman, helst eru væl meira veruleikanærar, enn verandi metingarnar. Er hetta rætt, so eru samlaðu oljugoymslurnar í Saudi Arabia einar 70 mia tunnur, og av hesum eru tær 55 longu framleiddar.

Sama mynstrið er eisini galdandi fyri onnur OPEC-lond. Kuwait, Iraq og Arabisku emiratarnir søgdu seg brádliga hava goymslur á 90 mia tunnur, heldur enn 30, soleiðis at tey eisini kundu fylgja við í eini kvota-skipan, og tí eru greiðar ábendingar á, at talan seinastu fjórðings øldina hevur verið um yvirframleiðslu í ovurmát.

### Sum gomul fólk

Og aldurin á feltunum er eisini ein trupulleiki, vísir Simmons á, og sammetur hetta við fólk, tá tey eldast.

Flestu av feltunum í Saudi Arabia eru um 50 ára aldur, og sum rithøvundurin sigur, so kunnu hesi metast við menniskju, um vit skulu kanna eftir, hvussu hesi eru um 20 ár.

Tekur tú tey fólk, sum eru 50 ár í dag, hvussu hava tey tað so sum 20 ár? Nøkur eru deyð, men fyri tey flestu er galdandi, at ymisk smærri brek gera um seg. Gerandisdegurin verður ikki eins lættur, og yvir høvur er talan um minni lívsgóðsku, sæð úr einum fysiskum sjónarhorni. Og júst soleiðis er eisini við oljufeltunum. Eftir meira enn 50 ár, har milliardir av tunnum eru pumpað upp, eru feltini farin at slítast. Tað er nú dýrari at fáa oljuna úr undirgrundini, og góðskan er heldur ikki tann sama, og tí er prosessin at raffandera ráværuna eisini dýrari.

### Skilaleys framleiðsla í heila øld

Grundað á omanfyristandandi, so ivast amerikanski serfrøðingurin ikki í, at verandi kreppan í oljuídnaðinum við methøgum prísum bert er byrjanin í so máta.

- Tað er eingin sum helst møguleiki fyri, at Saudi Arabia uttan víðari kann leggja fleiri milliónir tunnur afturat dagsframleiðslu teirra. Tí ivist eg ikki í, at eftirspurningurin eftir olju framhaldandi fer at vera væl størri enn útboðíð, og tað trýstir prísin uppeftir.

- Og er olja altso rættiliga bílig. Við einum prísi á 65$ fyri tunnuna, er prísurin einans 10 cents fyri eina sodavatnsflœsku av olju. Og tað er altso munandi minni, enn fólk rinda fyri vatn nógva staðni í heiminum!

- Og søguliga hava oljuprísirnir verið so nógv lægri. Í veruleikanum er ídnaðarheimurin bygdur á eina trúgv, at ein "normalur" oljuprísur liggur um einar 15-20$ fyri tunnuna, og tað er ein prísur, sum snøgt sagt hevur gjørt tað ógjørligt at halda gongd í eini skilagóðari framleiðslu. Prísin rinda vit nú, tí tann oljan, sum er eftir, er dýr at fáa upp. Hon er skitin og runut, og er tí dýr at framleiða. Og tí koma vit at rinda ovurhonds stóra upphædd fyri hana, staðfestir Matthew R. Simmons.

Og tá tosar hann altso ikki um prísir, sum liggja um 75-80$ fyri tunnuna.

> ” *Í veruleikanum er ídnaðarheimurin bygdur á eina trúgv, at ein "normalur" oljuprísur liggur um einar 15-20$ fyri tunnuna, og tað er ein prísur, sum snøgt sagt hevur gjørt tað ógjørligt at halda gongd í eini skilagóðari framleiðslu*

- Nei, nei, nei. Oljuprísirnir kunnu lættliga bæði fimm- og tíggjufaldast. Og fyri mær at síggja, tykist heimurin enn ikki at reagera. Men tað verður kanska, sum tá Hitler hersetti Póland. Brádliga hevði hann bara gjørt tað, staðfestir hann at enda.

## Fingu boð í 1979

Longu í 1979 kom ein merkisverd kanning fram í amerikanska senatinum. Í 33 síðum varð greitt frá, at Saudi-Arabiska oljufelagið, Aramco, hevði lækkað framleiðslumál síni úr 25 mió tunnum um dagin til 12 mió um dagin. Orsøkin til hetta var, at felagið hevði avskrivað 70 mia tunnur av fjaldum oljugoymslum sum verandi veruleikafjarðar.

Í frágreiðingi varð høvuðsstaðfestingin, at oljugoymslurnar í Miðeystri ikki eru óavmarkaðar, og sjálvur ivast Matthew R. Simmons ikki í rættleikanum av hesi frágreiðing, og lagnan, sum hendan fekk, gevur eisini orsøk til illgruna.

Mett varð nevnliga, at upplýsingarnar í frágreiðingini vóru alt ov viðkvæmar, og tí varð hendan læst inni. Fyribils í 50 ár var ætlanin.

Í dag verður sagt, at fekk frágreiðingin tann gjøgnumlestur og tað uppmerksemi, sum hon hevði uppiborið, hevði alheims orkustøðan í dag verið ein heilt onnur. Tað hevði noytt heimssamfelagið at leggja ein nógv miðvísari orkupolitikk, sum soleiðis kundi verið førdur í trý átatíggju.

**-mørk**

## Krevur eina greiða ætlan

Tá tosað verður um, hvussu vinnast kann á hóttandi oljukreppuni, tykist Simmons hava greiða talu.

Sjálvur ivast hann ikki í, at fremsta málið má vera at finna nýggjar og varandi orkukeldur, soleiðis sum mannaættin eisini hevur gjørt fyrr. Frá viði til kol og frá koli til olju.

Somuleiðis er hann greiður fortalari fyri, at flutningsvinnan alt meira flytir seg yvir á kollektiva ferðslu. Heimaarbeiðspláss er ein annar háttur at spara orku upp á í so máta, og bara tað at venja fólk við at hugsa øðrvísi, tá matur skal keypast, kann eisini vera ein máti. Hví skulu til dømis føroyingar keypa kjøt úr Ný Sælandi, tá tað krevur munandi meira orku at flyta krov kring alla klótuna, heldur enn at keypa úr Hetlandi. Og hví skulu amerikumenn eta australsk súrepli, tá hesi eisini veksa í California.

Hóast hetta ljóðar lætt, so er tó einki at ivast í, at alt hetta ikki er nakað, sum verður gjørt uttan víðari. Men Simmons metir sjálvur, at verður ein miðvís ætlan løgd - og fylgd - so ber á hendan hátt til at spara onkra staðni millum 20 og 40% av dagsins oljunýtslu.

**-mørk**

## Saddam vildi hava prísirnar upp

Seinast í august mánaði vóru júst 15 ár síðani, at irakiski herurin hertók Kuwait. Oljuríkidømið á Miðeysturi var sjálvsagda málið hjá Saddam Hussein, og longu tá var veruligur vandi fyri, at prísurin fór upp um 100$ fyri tunnuna.

Tá sameindi herurin legði seg út í kríggið, var Kuwait longu hersett. Og hermegin var ávegis markinum móti Saudi Arabi. Hevði tann hersetingin eydnast, vildi irakiski einaræðisharrin stýrt 15% av allari heimsframleiðsluni.

At prísirnir ikki fóru longur upp ta ferðina, komst eina og aleina av, hvussu skjótt Saudi Arabia megnaði at økja um framleiðsluna. Eftir 90 døgum øktu teir framleiðsluna úr 5 í 8 mió tunnur um dagin.

Og tað eru júst slíkar framleiðsluøkingar, sum Simmons heldur vera vandamiklar fyri tann hugburð, sum hevur eydnkent framleiðsluna. At fólk halda, at »tá Saudi Arabia hevur megnað slíkar økingar í 70 ár, hví skulu teir so ikki megna tað í 70 ár afturat?«

**-mørk**